## ÍF vann á SÍ

Mikukvøldið var ein dystur á skránni í meistaradeildini hjá monnum á Kambsdali. Har tók eitt av oddaliðunum, ÍF, ímóti SÍ, sum liggur aftast. Men dysturin bleiv javnari enn vænta. Tá trý sett vóru spæld førdi SÍ 2-1. Fjórða sett gjørdist sera spennandi, men her megnaði ÍF at vinna 35-33. ÍF vann eisini avgerandi javnbrótaran, og sostatt hevur ÍF lagt seg undir liðuna á Mjølni á fremsta plássi. ÍF hevur tó leikt ein dyst færri. Vit hava tíverri ikki fingið settúrslitini frá dystinum.



## Henry ikki millum teir bestu

Fabio Cannavaro, Zinedine Zidane ella Ronaldinho? Heimsins besti spælari skal finnast millum hesar, siga landsiðsvenjarar og -liðformenn, sum ikki hava Henry millum teir bestu, hóast hann í ár var einasti spælarin, sum var í finaluni í bæði HM og í Champions League. Gerard Houllier finst hvassliga at valinum av Cannavaro sum ársins leikara í Evropa og metir, at Henry skuldi vera longri frammi í røðini. Arsene Wenger sigur eisini, at atkvøðugreiðslan hjá France Football vísir, at fólk bert hugsaðu um HM-endaspælið, tá atkvøður vórðu lætnar. Heimsins besti spælari verður avdúkaður á FIFA-gallaveitslu í Zurich tann 18. desember.

## Jacob var fantastiskur

Eftir dystin fingu vit orðið á venjaran hjá Neistanum, Claus Rasmussen. Hann var sera glaður fyri sigurin ímóti kollfirðingum.

- Hatta var ein góðar dystur við høgum intensiteti, og tað sást, at bæði liðini ætlaðu sær sigurin. Eg haldi tó, at vit vóru oman á, og serliga Jacob í málinum var fantastiskur í dag. Men eg haldi eisini, at ungu leikararnir taka av møguleikanum í dag. Millum annað kemur Birgir inn á vinstra bakk og fær heili átta mál. Nú eru vit komnir í gongd aftur, og so fáa vit at siggja, hvussu langt tað røkkur. Málið er í øllum førum at enda millum trý tey ovastu.

Neistin-KÍF 30-27 (18-15)

# Jacob Larsen í serflokki

**Jacob Larsen spældi ein stóran dyst í málinum, tá Neistin megnaði at toga sigurin heim ímóti kollfirðingum í Atlantic Airways deildini.**

MANSHONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin hjá Neistanum hevur verið sera góð í ár. Eftir fimm umfør lógu teir fremst í bestu mansdeildini, men síðsta vikuskiftið kiksaði, tá teir taptu inni á Skála.

Hjá KÍF hevur eisini gingið væl síðstu dystirnar. Teir hava fingið fimm av seinastu átta stigunum, og tí var lagt upp til ein spennandi dyst á Hálsi mikukvøldið, har Neistin mátti vera bæði Áka Mørk og Roar Dalsgarð fyri uttan, meðan Røgvi Weyhe manglaði hjá KÍF.



*Neistin vann tepran sigur á KÍF, og serliga Jacob Larsen í neistamálinum vísti stórspæl.*

### Neistin var omaná

Í fyrra hálvleiki leikaði javnt á fyrstu løtuna. Leikferðin var høg, og tað sást týðiliga, at bæði liðini ætlaðu sær sigurin henda dagin. Neistin var tó oman á fyrstu løtuna, og eftir góðar 10 minuttir høvdu teir lagt seg fram um 9-6. KÍF var tó væl við, og fleiri ferðir vóru teir nær við at fanga Neistan aftur. Hetta eydnaðist tó ikki, og hálvleiksstøðan var 18-15 til Neistan.

Serliga ungi Birgir Poulsen vísti gott spæl í fyrra hálvleiki. Hann hevði fingið møguleikan á vinstra bakki henda dystin, og hann takkaði fyri álitið og skeyt heili seks mál í fyrra hálvleiki.

### Jacob tók broddin av KÍF

Gongdin var aftur jøvn fyrstu løtuna av øðrum hálvleiki. Liðini skiftust um at skjóta mál, og í onkrum førum var KÍF tætt við at fanga Neistan aftur. Neistin megnaði tó hvørja ferð at fara frá kollfirðingunum aftur, og nú byrjaðu danski málverjin hjá Neistanum, Jacob Larsen, at vísa sínar dygdir.

Ferð aftaná ferð bjargaði hann opnum møguleikum frá kollfirðingum, og tá KÍF ikki megnaði at skora, so tók Neistin av møguleikanum í hinum endanum. Tá 15 minuttir vóru farnir høvdu teir økt upp í 26-20, men nú raknaðu kollfirðingarnir tó við. Tá fimm minuttir vóru eftir høvdu teir minka niður í 28-25, og í hesi løtuni misnýttu teir ein opnan møguleika og brendu eitt brotskast, og so var í roynd og veru avgjørt.

Endaliga støðan gjørdist 30-27 til Neistan í einum spennandi og intensum dysti, har Neistin førdi at kalla allan vegin. Stóri leikarin var tó Jacob Larsen, sum veruliga tók broddin av KÍF liðnum. Við sigrinum heldur Neistin fast um góðu støðuna í oddinum.

### FAKTA

**Neistin-KÍF 30-27 (18-15)**

**Brotskøst:** Neistin 5, KÍF 6
**Útvísingar:** Neistin 7, KÍF 4
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3x2 min), KÍF 2 (1 beinleiðis, 1 3x2 min)
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Birgir Poulsen 8, Tróndur Kragesten 8 (2), Blagoje Buha 6 (1), Dann Thorleifsson 5, Carl Herup Olsen 2, Jóhan Brekkstein 1
**KÍF:** Damir Oros 7, Arnbjørn Hansen 5, Daniel Rapa 5 (1), Karl Johan Djurhuus 4, Gert Hansen 3, Petur M. Poulsen 2, Teitur Joensen 1

## Vit skora ikki upp á møguleikarnar

Vit fingu eisini orðið á strikuspælaran hjá KÍF, Gert Hansen. Hann var skuffaður av tapinum, men ásannaði, at Jacob í neistamálinum stóð ein stóran dyst.

- Vit eru sera uppsettir í dag, og tí er sjálvandi keðiligt at tapa. Vit fylgja væl við teimum at kalla allan dystin, men trupulleikin er, at vit skora ikki uppá møguleikarnar hjá okkum. Tó skal leggjast afturat, at Jacob stendur ótrúliga væl í málinum, og hann tekur veruliga móti frá okkum í seinna hálvleiki. Eg haldi tó, at vit kempa til tað síðsta, men í dag var hetta bara ikki nokk.

H71-Kyndil 21-33 (9-13)

# Kyndil av aftasta plássi

**Kyndil vann stórsigur á H71 í Atlantic Airways deildini mikukvøldið, og nú tykjast kyndlarnir at hava fingið gongd á spælið.**

MANSHONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Botndystur var í Hoyvíkshøllini mikukvøldið, tá H71 tók ímóti Kyndli. Gongdin hjá hesum báðum hevur ikki verið serliga góð í ár, so tí var umráðandi hjá báðum liðunum at fáa tvey stig í hesum dystinum.

### Kyndil betri byrjan

Fyrstu løtuna var líkt til, at áskoðararnir fóru at fáa ein friðarligan dyst í Hoyvík mikukvøldið. Liðini høvdu nevniliga ilt við at skora, og eftir góðar seks minuttir var støðan 1-1. Men so fekk Kyndil glið á álopsspælið. Næstu løtuna megnaðu teir at leggja seg á odda, og leiðsluna hildu teir líka til hálvleiks. Hálvleiksstøðan í dystinum var 9-13, og Kyndil hevði eisini verið betra liðið í fyrra hálvleiki.

### Kyndil fekk gongd á

Var fyrri hálvleikur javnur, so var eingin slingur í valsinum hjá Kyndli í seinna hálvleiki. Fyrstu løtuna var munurin ikki stórur á liðunum, men knappar 10 minuttir inn í seinna hálvleik leyp Kyndil avstað. Teir øktu frá 12-15 upp í 12-19, og nú sá ikki gott út hjá hoyvíkingum. Sum dysturin leið økti Kyndil bara meir um leiðsluna, og tá dómarin bríkslaði á síðsta var støðan 21-33, og sostatt hevði Kyndil fingið sín næsta sigur í ár.

Kyndlaleikararnir vóru sum vera man glaðir fyri sigurin á H71.

- Í dag vísa vit betri disiplin, og so stendur verjan knasandi væl. Eg haldi at vit sóu glimt av rætta kyndilsliðnum í dag, segði ein væl nøgdur Hjalti M. Jacobsen eftir dystin.

Hjá H71 kom ósigurin illa við, og nú eru teir nýtt botnlið í bestu mansdeildini.

- Einki riggar hjá okkum í dag. Vit spæla illa, brenna ov illa, og so fáa vit ongantíð verjuna at koyra. Harafturat spæla vit ov individuelt, og tá kunnu vit ikki fáa røttu úrslitini, segði Poul K. Dam eftir dystin.

### FAKTA

**H71-Kyndil 21-33 (9-13)**

**Brotskøst:** H71 0, Kyndil 5
**Útvísingar:** H71 3, Kyndil 2

**Málskjúttar:**
**H71:** Esbern Patursson 4, Poul K. Dam 3, Gunnar Bláberg 3, Tróndur Vatnhamar 3, Niels V. Niclassen 3, Dánjal Tórgarð 3, Janus Sørensen 2
**Kyndil:** Rókur Akralíð 9, Hans Áki Dal Christiansen 7, Høgni Klein 5, Hjalti M. Jacobsen 4, Ragnar Stakksund 2, Hans Arni Thomsen 2, Hanus Johansen 2, Janus E. Sørensen 2